# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Varaskúlastjóri settur í Hvalbiar skúla



*Eydna Danielsen er nýggjur varaskúlastjóri í Hvalbiar skúla*

Eydna Danielsen í Hovi er sett sum nýggjur varaskúlastjóri í Hvalbiar skúla, har hon eisini hevur starvast seinastu tvey árini.

Eydnu Danielsen er 46 ára gomul. Hon tók lærarautbúgving sína á Esbjerg Seminarium í 1987.

Í samfull 18 ár hevur Eydna verið einalærari í Sandvík, men seinastu tvey árini hevur hon verið í farloyvi frá hesum starvi. Hesi árini hevur hon arbeitt sum lærari í Hvalbiar skúla.

## Frímerki við heimafuglum og bíbliutýðarum




*Astrid Andreassen hevur teknað frímerki undir heitinum Heimafuglur*

Mánadagin 11. juni 2007 gav Postverk Føroya út seks nýggj frímerki.

Út kom eitt smáark við trimum frímerkjum á 5,50 kr, sum avmynda teir tríggjar sum týddu Bíbliuna til føroyskt: Jákup Dahl, K.O. Viderø og Victor Danielsen.

Edward Fuglø hevur teknað.

Trý frímerki undir heitinum Heimafuglur komu eisini út. Tey avmynda ávíkavist hønur, dunnur og gæs. Virðini eru 9,- 20,- og 25,- kr.

Astrid Andreassen hevur teknað.




*Edward Fuglø hevur teknað frímerkini við bíbliutýðarunum: Jákup Dahl, K.O. Viderø og Victor Danielsen*

# Klokkan í SMS 20 ár




*Fyri 20 árum síðan stovnaði Hans Korsgaard ursmúkku- og gávuhandilin Klokkan, sum í dag heldur til í SMS*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í oktober eru liðin 25 ár síðan danin Hans Korsgaard í »Klokkuni« í SMS kom til Føroya at arbeiða sum ursmiður og 9. juni 2007 vóru 20 ár síðan Klokkan á fyrsta sinni læt upp í Dr. Jacobsensgøtu í Havn**

HANDIL

Í hesum døgum verður hátíðarhildið at ur-smúkku- og gávuhandilin Klokkan í SMS fyllir 20 ár. Tað var Hans Korsgaard sum stovnaði Klokkuna í 1987, tá hann læt handilin upp í Dr. Jakobsensgøtu.

Sum úlærdur ursmiður fór Hans, sum kemur frá Ålborg-leiðini, til Sveis at læra meira um ur hjá Candino urverksmiðjuni. Síðan kom hann til Føroya at arbeiða sum ursmiður í sambandi við at »Ursølan« hjá Arnold Berg læt upp handil í SMS, tá annað byggistig av handilsmiðstøðini gjørdist veruleiki. Hetta var í oktober 1982.

Eftir at hava hildið til í Dr. Jacobsensgøtu síðan 1987 flutti klokkan sum sjálvstøðugur handil í SMS í 1990. Í 1997 var handilin lagdur saman við tveimum øðrum handlum, sum fingu navnið 3-arin. Nú eitur handilin aftur Klokkan.

Í sambandi við 20 ára føðingardagin hevur Klokkan nøkur góð tilboð og eina brúðarframsýning á Torginum í SMS við trúlovilsisringum og øðrum. Eisini verður gamli Fordurin hjá Hans við á framsýningini. Hans er nevndarlimur í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør og eigur einum flottan svartan Ford A frá 1930.

**mg**

# Skotar leita eftir flaggi



*Tað er hesum flagginum skotarnir leita eftir. Flaggið er blátt og hvítt*

Skotsku áskoðararnir, sum vóru í Føroyum í sambandi við landsdystin millum Føroyar og Skotland mikudagin 6. juni, hava mist eitt stórt flagg/bannara, tá teir vóru her og vilja fegnir hava tað aftur, tí tað kostaði teimum nógv.

Teir siga soleiðis í skrivi til ferðaskrivstovuna Green Gate Incoming í Havn:

“They have lost our enormous football banner/flag. It is about 10 metres long and 3 metres broad. The words on it are : BONNYBRIDGE TARTANARMY. It was in a black or dark navy-blue rucksack/bag.

The flag is a big white cross on a blue background (Saint Andrew’s cross - the patron saint of Scotland). They may also have left it in a bar or restaurant in Torshavn.

Could you create publicity about its loss - perhaps a feature in your local newspapers to ask everyone if anyone has found it. Please do your best”.

Tey, sum vita nakað um flaggið, kunnu venda sær til Greengate Incoming P/f, undir Bryggjubakka 3, Tórshavn, tel. 350520, mail adressa: hilda@greengate.fo.